| | | |
|---|---|---|
| **LD-Vegleiðing** | Dato 27. oktober 1999 | Ár-nr. **1999-10** |
| Til **Stovnar hjá landinum** | LD j. nr. 8271-15-5/99 | Síða |
| Heiti **Vegleiðing um arbeiðssteðg, samsvarandi sáttmála** | | |

**1) Setanarviðurskifti**

Tá ið arbeiðssteðgur verður settur í verk, halda setanarviðurskiftini uppat, og starvsaldur verður ikki vunnin, meðan arbeiðssteðgurin er.

**2) Løn**

Lønin hjá starvsfólki, sum er í arbeiðssteðgi, skal verða afturhildin fyri tíðina, arbeiðssteðgurin er.

Hetta er eisini galdandi fyri starvsfólk, sum er *sjúkrameldað, í barnsburðarfarloyvi, orlov við løn ella við niðursettari løn.* Goldin verða heldur ikki *frítíðarløn, frítíðaríksoyti og eftirlønargjald.*

Tá ið arbeiðssteðgurin er av, hevur arbeiðsgevarin skyldu aftur at rinda løn o.a., við teirri treyt, at setanarviðurskiftini verða tikin uppaftur.

**3) Starvsaldur**

Tá ið setanarviðurskiftini verða tikin uppaftur, heldur starvsfólkið vanliga fram við tí lønar- og starvsaldri, sum tað hevði fyri arbeiðssteðgin.

**4) Lata inn lutir**

Starvsfólk, sum eru rakt av arbeiðssteðginum, hava ikki rætt at vera á arbeiðsstaðnum. Øll koma undir hetta, eisini álitisumboð. Arbeiðsgevarin kann krevja, at tey lata inn lutir, sum stovnurin eigur (t.d. lyklar og amboð).

**5) Frítíð**

Frítíð verður ikki vunnin, meðan arbeiðssteðgur er.

Starvsfólk kann ikki fara í frítíð, fríganga ella hava sáttmálafrídagar, eftir at farið er í arbeiðssteðg. Hetta er eisini galdandi, um avtala varð gjørd um frítíð, frígongu ella sáttmálafrídag, áðrenn farið var í arbeiðssteðg.

Starvsfólk, sum var í frí ella frígekk, áðrenn farið varð í verkfall, skal tó halda avtalaðu frítíðina ella frígonguna.

**6) Skeið o.a.**

Til ber ikki at fara á skeið, meðan arbeiðssteðgur er, veitir arbeiðsgevarin tænastufrí við fullari ella við niðursettari løn. Er starvsfólk farið á skeið, áðrenn arbeiðssteðgurin varð settur í verk, er meginreglan, at starvsfólkið gevst á skeiðnum, tá ið farið verður í arbeiðssteðg. Avtala kann tó verða gjørd við felagið um undantak.

**7) Hvør er ikki í arbeiðssteðgi**

Arbeiðssteðgurin er bara fyri tey, sum eru limir í fakfelagnum. Tey, sum ikki eru limir, hava rætt og skyldu at vera í starvinum.

*Næmingar*

Næmingar, t.d. skrivstovunæmingar, eru ikki raktir av arbeiðssteðgi. Teir skulu í arbeiðssteðginum fáast við tílíkt arbeiði, sum teir eru í læru í. Verður neyðugt at senda teir til hús, skulu teir fáa vanliga løn.

*Starvsfólk, sum eru undantikin*

Meginreglan er, at arbeiðssteðgur rakar ikki stjórar og leiðarar. Í summum sáttmálum og høvuðsavtalum er betur allýst, hvar markið er. Annars kann verða gjørd serlig avtala um ávís størv.

Stovnar eiga í góðari tíð at boða Fíggjarmálastýrinum/Lønardeildini frá, um neyðugt er at gera serliga avtalu við felagið um ávís størv.

*Tænastumenn*

Tænastumenn kunnu ikki fara í verkfall.

**8) Arbeiði, sum er rakt av arbeiðssteðgi**

Starvsfólk, sum eru limir í *øðrum feløgum*, kunnu nokta at gera arbeiði, sum er rakt av arbeiðssteðgi.

Harafturímóti kann verða álagt starvsfólkum, sum *ikki eru limir í fakfelag*, at gera annað arbeiði, eisini arbeiði, sum er rakt av arbeiðssteðgi.

Fyri *tænastumenn* galda vanligu reglurnar í tænastumannarættinum, jf. §§ 10 og 11 í tænastumannalógini, t.e. teimum kann verða álagt at gera arbeiði, sum er javnsett ella hægri, í somu tænastugrein. Tænastumonnum kann tí verða álagt at gera arbeiði, sum er rakt av arbeiðssteðgi, kemur tað undir §§ 10 og 11 í tænastumannalógini.

Fíggjarmálastýrið, Lønardeildin 27. oktober 1999

L.v.

Thomas Magnussen